# Norðuratlantiski snultarabólkurin

VIRGAR T. DALSGAARD



Tá ið Høgni Hoydal beit høvdið av allari skomm og bønaði og bað leiðsluna í Fólkatinginum um at víkja frá vanligari proceduru og viðurkenna seg og tveir grønlendingar sum ein sjálvstøðugan "fólkatingsbólk", misti hann tað allarseinasta vetið av respekt millum danskar politikarar og journalistar. Teir tríggir norðuratlantisku snultararnir hava síðani bara verið mettir sum óseriøsir pausuklovnar á Fólkatingi.

Grønlendingar og føroyingar hava einki til felags. Tað eru tvey samfeløg, sum socialt eru sum nátt og dagur. Harafturat eru vit beinharðir konkurrentar, og gamalt er, at man aldrin fraterniserar við konkurrentinum!

Lisbeth Petersen vildi ikki vera við í hesi órímuligu og ódámligu konstruktión, og tað skal hon eiga bæði takk og virðing fyri! Tí óansæð hvat HH og grønlendingarnir royna at billa fólki inn, so vita tey flestu, at sanna endamálið við norðuratlantiska biddarabólkinum var bara at pressa órímuligar pengaupphæddir frá danska skattgjaldaranum, sum so kundu stúvast beint niður í teir pengagrammu kraddararnar, Kleist, Hoydal og Lars Emil. Hesir tríggir fólkatingsbiddarar eru annars menn, sum í reypandi løtum gorra um sjálvbjargni og at standa á egnum beinum.

Men teir flestu danskarar, sum fylgja við í politikki kenna ta vitleysu konstruktiónina, sum norðuratlantiski grulvigarðurin er! Teir yppa øksl, rysta við høvdinum og hava djúpa vanvirðing fyri slíkum samvitskuleysum lukkuriddarum. Men eingin hampamaður vil hava nakað við henda nassarabólkin at gera.

Arnfinnur Kallsberg fekk harafturímóti mikla virðing millum danskarar, tá ið hann noktaði at vilja vera við í biddarabólkinum.

**Politisk kúvending?**

Men nú hoyrast aðrir og óhugnaliga skurrandi tónar í valstríðnum. M.a. verður føroyski Javnadarflokkurin lagdur undir at vilja sleppa sær uppí biddarabólkin! Hetta hevði ikki bara verið ein háðan av tí danska skattgjaldaranum, men eisini eitt uppgerð við alla anstendigheit og øll socialdemokratisk ideal!

Tað kann aldri sigast ov hvassliga, at hvørki feðgarnir Dam ella nakar annar javnaðarhøvdingi nakrantíð vildu acceptera eina so ússaliga neyðstøðu sum at fara og fylkjast við politiskum mótstøðumonnum úr heilt øðrum flokkum fyri at "nassa" sær til fíggjarligan og p.t. ómoralskan fyrimun. Slíkt er ómanslig kradding og ússalig bidding, sum socialdemokratar til allar tíðir mugu vanvirða og halda seg langt burtur frá. . Politikkur er ikki óvitaspæl, men seriøst stríð, og tað stríðið skal sjálvandi stríðast við blonkum vápnum, ikki við fuski, snulting ella kraddaralyndi.

Tað má tí her í evstu løtu verða gjørt javnaðarfólki greitt, at vit vilja aldrin vera at finna millum teir óseriøsu politisku óvitarnar, sum mynda norðuratlantiska biddarabólkin. Vit vilja ikki halda danskar skattgjaldarar fyri spott, og vit vilja ikki brúka Fólkatingið sum politiskan grulvigarð.

Tað hevði klætt leiðsluni í Javnaðarflokkinum at gjørt veljarunum púra greitt, at tað er eitt mark fyri, hvussu langt niður í køstin, man kann fara í politikki. Harniðri sum Høgni Hoydal og teir báðir grønlendingarnir liggja og fonglast, mugu socialdemokratar aldri verða at finna. Eingin, sum troystar sær niður í køstin hjá norðuratlantsrukkunum kann sleppa undan tí rama stankinum av populismu, machiavellistiskum maktmisbrúki og ócharmerandi pengagrádigheit:

Í løtuni fáa teir tríggir nassararnir tilsamans meira enn tvær milliónir útyvir tað, teir moralskt hava rætt til sum aðrir fólkatingslimir, og tað er bara tí, at teir hava verið og grátið fyri fólkatingsleiðsluni og fingið dispensatión, so tað kann fossa danskur eykapeningur niður í teirra botnleysu strembaramappur. Hetta er privati og høgnesiski norðuratlantiski "blokkurin" – og tann blokkurin má ikki skerjast!

Lat okkum javnaðarfólk leggja stóran sjógv til tey intrigantu og mannminkandi lokabrøgdini hjá okkara skammleysu norðuratlantisku charlatanum! Næstu ferð tjóðveldisfólk fara at knarra um blokkniðurskurð, átti hesin norðuratlantiski biddarablokkur at verid heilt strikaður!


Vágs Kommuna

Kunngerð

Vísandi til at fólkatingsval er útskrivað og verður týsdagin 13. november 2007, verður hervið kunngjørt, at veljarar greiða atkvøðu í samkomuhøll skúlans. Atkvøtt verður frá

**kl. 09.00 til kl. 20.00**

ella so leingi, veljarar møta uttan steðg.

Veljarar, ið hava rætt at nýta brævatkvøðu, kunnu greiða atkvøðu á býráðsskrivstovuni til og við **leygardagin 10. november 2007 kl. 17.00.**

Tey, ið vegna sjúku ella vantandi førleika ikki kunnu koma á valstaðið, kunnu velja heima í seinasta lagi leygardagin 10. november 2007, men má boðað verða frá til býráðsskrivstovuna tlf. 373024 í seinasta lagið kl. 15.00 henda dagin.

Valkort verða send øllum teimum, ið standa á vallistanum. Veljari, sum ikki fær valkort, ella fær valkort við villum í, eigur at venda sær til Býráðsskrivstovuna sum skjótast.

**Valstýrið í Vági**


# Óhefta umboðið á danatingi

Val x



JÁKUP PETERSEN

Javnaðarmaðurin John Johannesen skrivar í bløðunum at danska grundlógin ikki longur skal verða galdandi í Føroyum, og fyri at ongin yvi skal verða, endurtekur hann tað á Rás 2.

Partamaður hansara Kristian Magnussen svarar aftur í útvarpinum, at hann ikki gongur inn fyri føroyskari grundlóg. Er tað tað sama sum, at javnarflokkurin ikki vil, at Føroyar skulu hava grundlóg í heila tikið?

Hesin arbeiðsháttur er ein av ársøkunum til at eg havi valt, at stilla upp til fólkatingsvalið. Vit hava flokkar og einstaklingar í flokkum, sum koma við mótsigandi og ørkimlandi boðum um líkt og ólíkt so, at ein til tíðir ikki skilir hví teir eru í einum flokki.

Men helst er tað taktikkur aftanfyri. Taktikkur klektur á danatingi fyri at føra fram á pall í Føroyum og grugga so mikið nógv, at fólk ikki vita hvat er upp ella niður.

Móti hesum virkar Tjóðveldi sum ein klárur viti við greiðum málum og ætlanum har gjøgnumskygni er ein hornasteinur. Tjóðveldi vil við fólkaatkvøðu samtykkja føroyska grundlóg, ið ásetur stjórnarskipan Føroya, grundleggjandi rættindir og skyldur hjá øllum íbúgvum landsins.

Loysa okkum frá gomlum forðingum og politiskum bondum.

Hetta er greið tala og røddin er Tjóðveldi. Ikki einstakir persónar sum helst við duldari ætlan grugga viðurskiftini.

Men hvussu hongur hetta saman við, at vit vilja hava umboð á danating. Er tað nøkur meining í at sita har og lurta eftir donskum viðurskiftum og møguliga luttaka í donskum avgerðum.

Eftir drúgvum royndum er svarið, so løgið tað ljóðar, ja. Tað er júst á danatingi at ávísir flokkar og umboð úr Føroyum fáa sær íblástur. Tað er júst har, at ætlanir verða lagdar av dønum fyri, at verða borðreiddar av føroysku umboðunum í Føroyum á ein slíkan hátt, at fólk ikki rættuliga eru greið yvir hvat tað er tey hava gloypt fyrr enn bitin er svøldur.

Tí er tað so umráðandi við tí óhefta umboðinum. Tí hava vit tørvin á tí frælsu føroysku røddini og tí skal okkara umboð fanga ótespuligar ætlanir longu í stoypiskeiðini áðrenn tær byrja, at gerða skaða um seg í Føroyum.


Reyði Krossur Føroya

**Lær 1. hjálp**
**Skeið byrjar 18. nov. 2007**
**um undirtøkan er nóg stór.**
**Kostnaður kr. 700,-**

Sí heimasíðuna
**www.redcross.fo**

**Reyði Krossur Føroya**
redcross@redcross.fo
Tlf. 283630 ella 317841



Ferðslusamskipari og Sølusamskipari

Tvey spennandi størv sum Ferðslusamskipari og Sølusamskipari eru leys at søkja á Strandfaraskip Landsins. Umsóknarfreistin er 8. novembur. Sí lýsingarnar á heimasíðu okkara www.ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS